





# Jólagávan til hana fæst í Klivanum

Mótahandilin Klivin í miðbýnum í Havn er á tremur við jólagávuhugskotum til kvinnur.

Har er alt tað nýggjasta og mest modernaða innan klæðir og prýði at fáa.

Klivin er ein kendur mótahandil í Havn. Tað var Katrin í Gongini, sum stovnaði Klivan í SMS í 1988. Í 2005 yvirtóku Heibrith Jacobsen og Vagna Sørensen handilin og hildu fram í SMS til oktober 2008, tá handilin flutti oman í miðbýin.

Klivin er handilin til kvinnuna, sum vil verða smart ílatin á jólum. Handilin liggur væl fyri í Niels Finsensgøtu í miðbýnum í sama bygningi sum Thomas Dam Búnýti og blómuhandilin Akkuleya.

Klivin umboðar merkir, sum ikki eru at fáa aðrastaðni í landinum sum t.d. klæðir av merkjunum Stella Nova, Mads Nørgaard, SaintTropez, Oddmolly, Munthe plus Simonsen, Bitte, Day og Rabens Saloner í avslappaðum bohemskum stíli. Klivin selur klæðir í støddum frá 34 til 46.




Eisini selur Klivin skótoy av italienska merkinum Gidigio. Skógvarnir eru kendir fyri at verða so góðir at ganga í, at tey sum fyrst hava roynt einar Gidigio skógvar keypa teir altíð aftur. Klivin umboðar eisini produktini frá Tromborg sum t.d. make-up, smyrsl og ymisk krem til húðrøkt og vælveru, umframt pútur, stakar og bakkar frá Day Home og smúkkur frá SIF JACOBS.

Heibrith og Vagna eru báðar stylecouch. Tær hava verið á skeið hjá Tini Owild, har tær hava lært at síggja hvørji klæðir tær ymisku kvinnurnar klæða best. Tað hevur stóran týdning at kunnu ráðgeva og hjálpa kundanum, so hann fer væl nøgdur út frá okkum, siga tær.

Um tú ynskir at verða smart ílatin á jólum ella at fáa hjálp til at keypa eina góða jólagávu er bara at koma inn til okkum, siga Heibrith og Vagna frá Klivanum í miðbýnum.